*Nýggj borútgerð verður nú útviklað:*

# Serliga ætlað at bora í føroysku undirgrundini

JAN MÜLLER

Føroyska basaltið er so mikið hart, at tað verður torført ella ómøguligt at fáa lønsemi í boring eftir olju og gassi, um tú skal brúka ta higartil kendu tøknifrøðina.

Hetta verður tað nú arbeitt við at finna eina loysn á. Tá umboð fyri AMG-bólkin (Statoil, Mobil og Enterprise) vóru í Føroyum herfyri greiddu tey frá, at tað verður arbeitt við at brúka heilt nýggja boriútgerð, tá tá eina ferð kemur so langt sum til at bora við Føroyar.

Nú tykist so veruligt gongd verða komin á málið. John Ingehaug, jarðfrøðingur hjá Statoil sigur við Sosialin at avgjørt er at lata allan oljuídnaðin fáa atgongd til hesa nýggju boriútgerðina og eru 10 mill. kr settar av í einum stórum útviklingsprojekti, sum Rogalands Forskning hevur fingið til uppgávu at standa fyri. Hetta er ein almennur og privatur norskur granskingarstovnur, sum m.a. eigur Ullrig, ið er ein royndarboripallur, ið stendur á landi í Stavanger.

Ætlanin er at nýggja boriútgerðin skal vera klár til á vári 1998. Hetta er um tað mundið, tá oljufeløg hava sagt seg vera klár til at bora eftir olju við Føroyar. Onkur teirra vilja bora longu á heysti 98.

Tann nýggja boriútgerðin hevur sín uppruna í námsvinnuni, har brúktur verður ein slaghamari. Tað er ein slíkan slaghamara, sum ætlanin er at útvikla til at bora í tí harða og tjúkka basaltinum við Føroyar.

### Avgerandi

John Ingehaug sigur, at úrslitið av hesum projektinum er rættiliga avgerandi fyri eina komandi boring við Føroyar. Hann vísir á, at tað við verandi boriútgerð kunnu borast 2-3 metrar um tíman. Tá ein veit, hvussu stórur partur av eini oljuleiting sjálv boringin stendur fyri, so er greitt, at tú fært ikki lønsemi í eitt slíkt projekt við bert at kunna bora 2-3 metrar um tíman.

Tað er hetta, sum slaghamarborurin skal bøta um. Við honum skulu borast kanska eini 30 metrar um tíman.

Nýggja útgerðin verður m.a. útviklað við royndunum frá boringini í Lopra, har basaltið var ómetaliga hart. Feløgini, sum vóru við har, eru boðin at vera við í menningarprojektinum, sum nú fer í gongd á Rogalands Forskning.

John Ingehaug sigur við Sosialin, at nýggi borurin kann fáa stóran týdning fyri boring í hørðum grótsløgum aðrastaðni í verðini eisini, eitt nú í Miðeystri.

Men tað er greitt, at hann verður fyrst og fremst útviklaður til at brúka á øllum Atlantsmótinum, har tað finst hart og tjúkt basalt. Tvs. við Føroyar og eisini við Rockall og vestan fyri Ísland.







*Borurin - eftir slaghamarsprincippinum - sum verður útviklaður við royndum frá námsídnaðinum í Svøríki*




*John Ingehaug frá Statoil: Vit seta stórar vónir til nýggja borin og fara at royna hann við Føroyar - vónandi longu í 98.*




*Vit síggja, hvussu útreiðslurnar verða býttar í sambandi við eitt leitingarprojekt við vanligari boring og har seinni flótandi framleiðsluskip verður brúkt. Boriparturin er nógv tann størsti. Við Føroyar, har alt er basalt, verður boriparturin alt ov dýrur, ber ikki til at bora skjótari.*





**Sunnudagin 29. des. kl. 16**
verður
**BINGO**
**í Tórskafeteria**

**TÓRSKLUBBIN**



## Skrivstovustarv

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Felagsskúlan á Oyrarbakka. Arbeiðstíðin er 14 tímar um vikuna.

Arbeiðið, sum m.a. fevnir um at halda roknskap skúlans, verður lønt eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri (9. lønarflokki).

Krav: Kunnleiki til CONCORDE-bókhaldsskipan og WORD og WORD-PERFECT tekstviðgerð.

Fyrimunur: Hollur kunnleiki í føroyskum og undirvísingarførleiki í framhaldsdeildini.

Skrivlig umsókn og prógv skulu sendast til **Felagsskúlan á Oyrarbakka, FR-450 Oyri,** *í seinasta lagi 30. desember 1996*

**Felagsskúlin á Oyrarbakka**
Tlf. 22156 22084